LØGMÁLARÁÐIÐ

Løgtingsskrivsstovan
Att: Fíggjarnevndin
Tinghúsvegur 1-3
Postbox 208
100 Tórshavn

27. juni 2008
Mál: 1307-021/07-108
Viðgjørt: HUS/HIH

# Fíggjarnevndarskjal

**a. Inngangur**

Landsstýriskvinnan í løgmálum søkir við hesum Fíggjarnevndina um at hækka játtanina til høvuðskontu 14.38.2.01. Strandfaraskip landsins (Landsfyritøka) við 8.738 tkr.

**b. Málsfrágreiðing**

Í sambandi við at M/F Smyril hevur trupulleikar við stabilisatorunum, eru SSL saman við japansku Mitsubitshi verksmiðjuni vorðin samd um at seta skipið í dokk. Hetta fyri endaliga at fáa staðfest og umvælt brekið/brekini, sum hava verið við finnunum, líka síðan skipið kom úr Spaniu í 2005.

SSL hevur við hjálp frá kavarum roynt at hildið finnurnar í drift í vetrarhálvuni, og hevur hetta verið orkukrevjandi og kostnaðarmikið arbeiði.

Umboð fyri verksmiðjuna hava verið í Føroyum og kannað trupulleikan. Við tað at garantitíðarskeiðið er farið, hevur SSL tó gjørt avtalu við verksmiðjuna, at teir bera allan kostnaðin av eykalutum til finnurnar í sambandi við arbeiðið, sum verður gjørt.

Umframt útreiðslurnar til eykalutir koma útreiðslur eisini til sjálva dokkingina, avloysaraskip og eykamanning v.m.

Áðrenn Smyril skuldi í dokk í sep.-okt. 2007, var spurningurin um, hvat skuldi gerast við trupulleikarnar, ið vóru staðfestir á stabilisatorunum, viðgjørdir innanhýsis á SSL. Avgjørt varð, at SSL skuldu seta seg í samband við verksmiðjuna, sum hevði framleitt og útvegað stabilisatorarnar.

Í august 2007 var eitt umboð fyri Mitsubitshi heima í Føroyum fyri at eftirhyggja stabilisatorunum. Nakrir boltar, sum halda einum flansatetningi upp á pláss, vóru brotnaðir í báðum borðum. SSL vildi tí hava staðfest eina orsøk til henda trupulleika. Hettar var hent nakrar ferðir gjøgnum veturin, og var trupulleikin hvørja ferð loystur við at senda kavarar niður at skifta boltarnar. Hettar var ein sera dýr og ikki haldgóð loysn fyri SSL.

Eftir at inspektørurin frá Mitsubishi hevði kannað anleggið til finnurnar inni í skipinum og sæð filmsupptøkur av finnunum uttanborða, var niðurstøða hansara, at trupulleikin mátti liggja í sjálvum boltunum - at teir vóru ov veikir.

Postboks 159 · 110 Tórshavn · Tlf 358080 · faks 358085 · imr@imr.fo · www.imr.fo

Inspektørurin dugdi ikki at síggja nakað óvanligt, annað enn, at anleggið inni í skipinum arbeiddi aftur og fram, tá tað var nakað at í sjónum. Avgjørt varð, at inspektørurin skuldi fyrireika eina neyvari kanning og útvega eykalutir, áðrenn skipið skuldi í dokk, fyrst í oktober 2007.

Tá ið Smyril var komin í dokkina, fór ein serfrøðingur frá Mitsubishi verksmiðjuni beinanvegin í gongd við at kanna finnurnar. Niðurstøða hansara var, at neyðugt varð at skifta allar boltarnar á áður umtalaða flansatetninginum. Hesir boltar vóru síðan skiftir í báðum borðum, og vóru finnurnar uppmáldar.

Enn eina ferð kom serfrøðingurin til ta niðurstøðu, at onki óvanligt var við finnunum. Alt hettar er útgreinað í frágreiðingini/rapportini, ið SSL fekk frá honum.

SSL bað um at fáa finnurnar trýstroyndar (belastaðar) við 50 tonsum fyri at finna eina orsøk til, at anleggið inni í skipinum arbeiddi í vánaligum líkindum. Hettar metti serfrøðingurin frá Mitsubishi vera ov nógv og vildi ikki trýstroyna (belasta) finnurnar við meira enn 15 tonsum.

Tá trýst (belastningurin) var á sást nakað av røringi á anlegginum innan, men ikki nær tí, vit høvdu sæð, meðan skipið var í sigling í vánaligum líkindum.

Eftir at Smyril fór í sigling aftur, varð einki óvanligt staðfest við finnunum, fyrr enn komið var út í feb. 2008, og Smyril kom í vánaligt veður, tá slitnaðu áðurnevndu boltar aftur.

SSL er saman við verksmiðjuni komin til ta niðurstøðu, at rættast er at taka finnurnar sundur og skifta allar búsningar, leiðir og boltar. SSL metir, at hetta er einasta brúkbara loysn.

Orsøkin til, at hetta mál hevur skund og verður framlagt nú, er, at trupulleikin sær bara út til at versna, og SSL vil staðiliga ráða frá, at farið verður undir enn ein vetur við stabilisatorunum í so ringum standi. Í ringasta fall kann núverandi brek hava við sær, at finnurnar ikki kunnu fáast inn. Um so er, kann skipið ikki leggja at kai.

### 14.38.2.01. Strandfaraskip landsins *(Landsfyritøka)*

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J+EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 128.003 | 8.738 | 136.741 |
| Útreiðslujáttan | 176.138 | 8.738 | 184.876 |
| Inntøkujáttan | 48.135 | - | 48.135 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðsla | 128.003 | 8.738 | 136.741 |
| **Útreiðslur** | **176.138** | **8.738** | **184.876** |
| 11. Lønir v.m. | 64.672 | 2.770 | 67.442 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 98.779 | 3.268 | 102.047 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 1.469 | - | 1.469 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 10.758 | 2.700 | 13.458 |
| 17. Avskrivngar o.a. | 250 | - | 250 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 210 | - | 210 |
| **Inntøkur** | **48.135** | **-** | **48.135** |
| *21. Søla av vørum og tænastum* | *48.135* | - | *48.135* |

### c. Grundgeving fyri framløgu

Orsøkin til, at biðið verður um, at málið verður framt við einum fíggjarnevndarskjali, er, at neyðugt er, fyri tað fyrsta at gera bindandi avtalu við skipasmiðjuna fyri at tryggja, at haldast kann fast við lægsta tilboðið, og í øðrum lagi at gera bindandi avtalu fyri at tryggja, at avloysaraskip er tøkt, tá Smyril ætlandi skal í dokk.

### d. Uppskotið

Vísandi til omanfyristandandi verður søkt um eykajáttan 8.738 tkr. til høvuðskontu 14.38.2.01. soleiðis, at á eykafíggjarlógini 2008 verður tikið við:

## § 14 Løgmálaráðið

## B. Játtanir

| 14.38.2. | | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Strandfaraskip landsins | J | 128.003 | - |
| | | **EYJ** | **8.738** | - |

**e. Tilsøgn frá Fíggjarmálastýrinum**
Fíggjarmálaráðið hevur givið tilsøgn til, at umsóknin verður send Fíggjarnevndini, av tí at málið hevur skund.

**Váttað:**

**Karsten Hansen**
**landsstýrismaður**

/

**Petur Alberg Lamhauge**
**fíggjarmálastjóri**

**Jóannes Eidisgaard**
**Løgmaður**

/

**Rúni Joensen**
**aðalstjóri**